# Tørvar okkum morgunlestrarnar, tá vit hava Hamas??

BJARNI DJURHOLM
løgtingsmaður



**Al Jazeera og Al Arabiya høvdu helst undrast á føroysku lýsingina av støðuni í Gaza**

Frá leygarmorgni árla og út á dagin vóru í útvarpinum áhaldandi endursendingar um skilið í Gaza. Við messurødd var ein vavstur av ákærum móti Ísrael varpaðar lurtarunum, har eitt konglomerat av keldum vóru grundarlagið. Independent, Reyði Krossur, norskur lækni, omma úr Gaza og onnur lýstu teir ræðuleikar, sum ísralear høvdu forvolt palestinum tær tríggjar vikurnar, sum kríggið í Gaza vardi.

Øll munnu vera samd um, at við kríggi fylgja ræðuleikar og vanlagnur, sum eru ótolandi. At kríggj og harðskapur er av tí ónda, eiga tað ikki at vera deildar meiningar um.

Kortini er mangastaðni um allan heim kríggj og forfylging gerandiskostur, har 100-túsundtals fólk árliga verða kúgað, særd ella dripin. Tað løgna er tó, at vit hoyra so lítið til ringa skilið í mun til allar ræðuleikarnar.

**Munur á**

Øðrvísi er við stríðnum millum Ísraelar og palestinar (Hamas). Her eru miðlar--nir á tremur við ákærum móti Ísrael. Seinasta nýggja eru so krígsbrotsverk.

At Hamas farnu árini hevur sent út við 7000 rakettir inn í Suðurísrael hevur tó lítið tíðindavirði.

At Hamas uttan ávaringar sendir deyða inn í fjølbygd øki við eittans endamáli at ræða, skaða og drepa verður nærum ikki tikið upp á tungu.

At Hamas byggir alt sítt tilvergrundarlag á at javna Ísrael við jørðina og at reka allar jødar til havs verður tagt burtur.

At Hamas, stuðlað av Iran, er javnbært við islamiska fundamentalismu, har javnrættindi og virðingin fyri mannalívum er undantakið, meðan kúgan og dráp er meginreglan, verður góðtikið.

At Hamas er veruliga forðingin fyri friði millum Ísrael og grannarnar hevur ongan áhuga.

Og at Hamas undir krígnum herfyri nýtti møguleikan at drepa og burturbeina hópatals moderatar Fatahpalestinar og familjur teirra umframt, at Hamas jagstraði, píndi og særdi hundratals aðrar Fatah-limir, verður slettis ikki nevnt.

**Endursendingar**

Nei, tá er ómakin løttari at lesa 7 minuttir langan tendensiøsan tíðindastubba í almenna útvarpinum frá morgunstundini leygardag og so endursenda hann allan fyrrapartin og á middegi, fyri so at vinkla tíðindini av nýggjum leygarkvøldið.

Mundu Al Jazeera og Al Arabiya ikki havt undrast á føroysku lýsingini av støðuni í Gaza?

Seinasta vikan var hendingarík. Endursendingin av morgunlestrinum oyðilegði sendiflatuna, segðist. Og ístaðin fingu vit leygardagin annan morgunlestur, har Gaza var á skrá. Har Ísrael fekk toyggið og har islamistiska Hamas umvegis útleggingina varð friðað?! Forrestin, so var økisval í Irak fríggjadagin – uttan harðskap og dráp. Loksins ein sólskynssøga haðani, sum eisini Independent bar. Hvør frætti um tað?

# Hvat skuldi hatta vera gott fyri ..... ?

POUL MICHELSEN
Løgtingsmaður fyri Fólkaflokkin



**Bæði í stevnuskránni og í valskránni fyri valið 2008 hevur Fólkaflokkurin lovað, at menna hægri útbúgving og gransking. Hesum lyftum vil Fólkaflokkurin halda, og tí vilja vit í mest møguligan mun stuðla teimum ætlanum, sum eru um hægri útbúgvingar og um gransking. Lyfti Fólkafloksins eiga at síggjast aftur í tí politikki, flokkurin fremur og sjálvsagt eisini í teimum raðfestingum, ið gjørdar vera innan hesi øki**

Fróðskaparsetrið hevur hesa seinastu tíðina fingið drúgva viðgerð í fjølmiðlunum. Ikki so løgi, tí undan valinum vóru flest allir flokkar samdir um, at hægri lestur og gransking skuldi fáa hægri raðfestingar.

Læt meg siga beinanvegin, at Fólkaflokkurin heldur, at tað hevur stóran týdning - júst nú - at satsa upp á hægri útbúgvingar.

Tí er tað sera óheppið, at formaðurin í fíggjarnevndini, Anfinn Kalsberg, umboðandi Fólkaflokkin í almenna kjakinum, á ein rættuliga niðurgerandi hátt leggur eftir Setrinum og teimum fíggjarligu útrokningum, sum liggja til grund fyri virkseminum hjá Setrinum. Eisini fær útbúna fólkið ella, sum hann rópar tey, akademikararnir sum búgva her í Havn, av at vita. Umframt verða vit politikarar, sum ivaleyst "hoppa upp á vognin" hjá omanfyri nevndu, skírdir sum hentir idiotar. Sera primitivt og betri ósagt.

Eg havi hugsað nógv um, hvat hatta skuldi vera gott fyri, og dugi eg ikki at síggja, at úttalilsini hjá Anfinni tæna til fyrimuns fyri Fólkaflokkinum á nakran hátt. Heldur ikki fyri einum skilagóðum og ábyrgdarfullum búskaparpolitikki framyvir.

Men kanska er tað so einfalt, at ein sokallaður útjagarapolitikari, við slíkum úttalilsum, vinnur sær sjálvum nakað fyrimunir – annað kann tað ikki vera.

Sjálvt um eg als ikki eri serliga stoltur av avrikinum hjá fíggjarnevndini, so eri eg púra samdur við fíggjarnevndina og við fíggjarmálaráðharranum um, at karmurin um fíggjarlógina er gjørdur og hann verður ikki broyttur – tað vildi verði óðamannaverk.- men um vit hava mistikið okkum í játtanini til Fróðskaparsetrið, eiga vit at kanna, hvussu vit innan fíggjarkarmin kunnu rætta mistakið. Tað fer Fólkaflokkurin at hjálpa til við.

Eg haldi ikki, at fíggjarnevndin og setrið hava sama útrokningargrundarlag.

Míni ráð til Setrið skulu tí vera: Setið tykkum niður og gerið eina neyva lýsing av, hvat virksemi neyðugt er at hava fyri at frálæran kann liggja á einum rímuliga høgum støði. Havi í huga, at talan er um eina tíð við sera trongum fíggjarkarmi.

Mentamálaráðið eigur somuleiðis at endurskoða innanhýsis fíggjarætlanina og royna at finna eina felags virðiliga loysn – tað verður ein góð íløga – kanska tann besta - fyri Føroyar í hesum døgum.

# Ja til kapping, nei til dumping

JØRGEN NICLASEN
Uttanríkisráðharri



Fyrr í vikuni fekk eg ein spurning á løgtingi, um tað er í samsvari við Hoyvíkarsáttmálan, at íslendskar fyritøkur, sum fáa almenn arbeiðir í Føroyum, kunnu gjalda arbeiðsfólkinum íslendska løn.

Eg vil, at allir borgarar í landinum skulu fáa innlit í, hvussu hesi viðurskifti eru sett saman. Tískil vil endurtaka tað, sum eg áður havi sagt um hetta mál.

**1.** Lønarviðurskiftini á føroyska arbeiðsmarknaðinum eru ikki ásett við lóg, men við semju millum partarnar á arbeiðsmarknaðinum.

**2.** Hoyvíkarsáttmálin ásetur, at landsins lógir ikki mugu gera mismun millum føroyingar og íslendingar.

**3.** Lønarviðurskifti á føroyska arbeiðsmarknaðinum eru tískil ikki umfatað av Hoyvíkarsáttmálanum.

Sjálvandi eri eg ímóti, at sosial dumping fer fram á okkara arbeiðsmarknaði, og at føroyskir handverkarar ikki sleppa til arbeiðis í sínum egna landi. Vinnumálaráðið umsitur arbeiðsmarknaðarmál, og eg vóni, at partarnir á arbeiðsmarknaðinum saman við hesum myndugleika finna eina loysn á hesum trupulleika. Eisini kann jøvn kapping tryggjast í treytunum í almennari útbjóðing.

# Tálma niðurgongdini í búskapinum

EYÐGUNN SAMUELSEN
Løgtingskvinna



Løgtingið fer fyrst í komandi viku at samtykkja bankapakka II. Sostatt hevur løgtingið gjørt tað, sum í núverandi støðu kann gerast, fyri at fáa støðug viðurskifti innan okkara fíggjarkervi.

Tað sum stendur eftir er at viðgera og taka støðu til, um onnur tiltøk eru neyðug fyri at steðga niðurgongdini í búskapinum, og hvørji tiltøk talan kann verða um.

Javnaðarflokkurin hevur ta støðu, at hetta er ein spurningur, ið tað er sera átroðkandi at viðgera. Vit mugu ikki loypa framav, men fáa greiðu á, hvør er trupulleikin, hvussu skal hann loysast, og nær er rætta løtan.

**Búskaparstøðan**

Vit hava ávísar trupulleikar í fiskivinnuni bæði á sjógvi og landið. Kósavirkið er stongt, onnur virkir hava trupulleikar við útflutningstrygdini. Avreiðingarvirðið í 2008 var tað minsta í 10 ár. Arbeiðsloysið er vaksandi, kommununnar gera færri íløgur, og spurningurin er, hvussu stóran virknað íløguætlanin hjá landinum ferð at fáa á búskapin.

Hesi viðurskifti, meta vit, gera tað neyðugt at fara undir eina tilgongd, har støða verður tikin til, um vit politiskt eiga at seta nøkur eyka tiltøk í verk, fyri at forða fyri at samfelagshjólini fara ov langt niður í ferð, ella steðga heilt upp.

**Íløgurnar á fíggjarlógini**

Samtykta íløguætlanin á fíggjarlógini fyri 2009 er 234 mió. Hetta er ikki nakað stórt tal. Avgerandi spurningurin er, um hesir pengar viðføra eitt virksemið kring landið, ið kann mótvirka niðurgongdina í búskapinum.

Av hesum íløgum eru góðar 92,5 mió settar av til vegir, havnir og tunlar. Spurningurin er, hvussu stórur partur av hesi upphædd útloysir arbeiði av týdningi í ár, tí verkætlanninar ikki eru klárar at seta í verk. Eisini innan onnur øki er peningur settur av til verkætlannir, ið neyvan byrja í ár.

**Hvat kan gerast fyri at byrgja upp fyri arbeiðsloysi**

Verður komið til ta niðurstøðu, at tiltøk mugu fremjast, fyri at fyribyrgja ov stórum arbeiðsloysi, er alneyðugt, at tað vera tey røttu tiltøkini, ið verða framd.

Javnaðarflokkurin metir, at í minsta lagi hesar meginreglur, skulu havast í huga, tá ið støða skal takast til møgulig tiltøk:

- Íløgur, ið kunnu geva vinnuligan vøkstur av sær.
- Íløgur, ið verja umhvørvið
- Íløgur, ið nøkta ein veruligan tørv
- Íløgur, ið framtíðartryggja samfelagið

**Tiltøk ið kunnu fremjast**

Vit eiga at endurskoða og møguliga hækka íløguætlænina hjá landinum.

Vit kundu framskundað íløgur, ið skapa forteytir fyri gransking, sum eitt nú ílegusavnið. Henda íløga skapar eisini fortreytir fyri vinnugransking, ið kundi kastað nakað av sær.

Vit kundu sett pening av í Bjálvingargrunnin, so eisini sethús kunnu verða bjálvað betur og broytt lógina, so hon umfatar øll sethús.

Vit kundu økt játtanina til bygging av røktarheimum og nøkta tørvin skjótari enn í dag.

Vit kundu skapt møguleikar fyri umskúling/eftirútbúgving av arbeiðsfólki. Til dømis lagt dent á at nøkta tørvin av røktarstarvsfólki, ið bara økist komandi árini.

Soleiðis eiga vit, innan ein størri niðurgongd í búskapinum verður veruleiki, leggja okkum eftir at gera nakað við hesa gongd, og byrgja upp fyri niðurgongdini í búskapinum.

Javnaðarflokkurin er til reiðar at fara undir hesa tilgongd.